# Einki tubbak á Kongabrúnni

**Einasti serhandilin í Føroyum, ið hevur lagt seg eftir at selja tubbak, flytir nú av Kongabrúnni, har handilin Oscar F. Arge hevur hildið til í 64 ár. Thorstein Arge, eigari av handlinum, er vónbrotin av, at handilin ikki kann halda fram á sama staði**

FLYTING
*Stefan í Skorini*

– Tað er sera keðiligt, at vit nú mugu flyta handilin longur niðan í býin. Hetta er ein gomul forrætning í Havn, og tað er traditión fyri, at keypa tubbak á Kongabrúnni, og at fólk á hvørjum ári keypa sigarir til ólavsøku her, sigur Thorstein Arge, sum hevur rikið handilin seinastu fjúrtan árini.

Tá vit støkka inn á gólvið í handlinum hjá honum á Kongabrúnni, eru fólk í ferð við at flyta alla butikkina niðan í hattabúðina hjá Minu, sum nú letur aftur. Thorstein fer tó ikki undir at seyma húgvur til studentar komandi vár.

Hóast handilin skal flytast, so hevur Thorstein ongar ætlanir um at hava handilin stongdan. Flytingin skuldi fáast frá hondini mikudagin, og handilin skuldi síðani lata uppaftur hósdagin í nýggju hølunum í Niels Finsensgøtu.

Handilin hevur altíð verið ein býarmynd í Havn, og nógv munnu fara at hava ilt við at venja seg við, at tubbakshandilin á Kongabrúnni nú flytir longur niðan í býin. Handilin fer tó enn at vera í miðbýnum.

Orsøkin til flytingina er, at Tryggingarfelagið Føroyar hevur keypt bygningin, og felagið skal nýta hann til sítt virksemi.

### 64 ár á Kongabrúnni

Tað var Oscar Arge, sum á ólavsøku í 1938 lat upp tubbakshandil á Kongabrúnni. Oscar var farbróðir Thorstein, sum keypti handilin frá einkjuni eftir Oscar.

Thorstein keypti handilin í 1988, eftir at einkjan eftir Oscar hevði rikið hann síðan 1975. Seinasta árið hevur Thorstein selt tubbak í gomlu hølunum hjá Heimavirkinum, men áðrenn helt handilin til við síðuna av gullsmiðinum Niels L. Arge.

– Fólk koma enn á gátt hjá okkum og vilja hava skóleistar, tí tey vita ikki, at Heimavikrið er flutt, tekur Thorstein skemtiliga til.

Hann greiðir frá, at hann hevði verið sjómaður nærum alt sítt lív, áðrenn hann keypti tubbakshandilin á Kongabrúnni.

– Eg havi eina fortíð á sjónum, men eg hevði hug at royna nakað nýtt, og so keypti eg handilin, tá hann var til sølu. Tað havi eg tó ongantíð angrað, sigur Thorstein, sum festir sær í eina vanliga Prince, meðan vit práta.

– Eg royki Prince, og eg royki nógvar Prince, sigur hann, hóast ein kundi trúð, at ein tubbakssølumaður roykti okkurt meira ókent og eksotiskt merki.

### Einasti serhandil

Firma Oscar Arge er einasti serhandil av sínum slag í Føroyum, og tað er torført at fáa ein slíkan handil at bera seg.

– Tað er torført at reka ein slíkan handil í Føroyum, og umstøðurnar eru nógv broyttar seinastu árini. Síðan eg keypti handilin í 1988, hava vit havt eina búskaparliga kreppu, vit hava fingið meirvirðisgjaldið og kappingin er vorðin ómetaliga hørð, sigur Thorstein.

Handilin Oscar F. Arge er bæði heilsøla og smásøla. Tað vil siga, at hann selir tubbak til handlar kring landið og til havnarmenn, sum bara vilja hava ein pakka av prince ella eina sigar til ólavsøku.

– Vit eru einasti handil av slíkum slag í Føroyum, og vit hava eisini størsta úrvalið av tubakki. Tey, sum vilja hava okkurt heilt serligt slag av tubakki, hava sum oftast kunnað fingið tað her, sigur eigarin.

Aftur í ár hevur Thorstein selt eina rúgvu av sigarum til ólavsøkuna. Tað eru tó ikki tær kubansku sigarirnar, sum verða mest seldar.

Til hesa ólavsøkuna hava tey selt flest sigarir av slagnum Cubao Monarcho, sum eru av Filipsoyggjunum. Thorstein sigur, at tað loysir seg ikki at selja kubanskar sigarir í Føroyum, tí tær eru ov dýrar.

### Vónbrotin

Í upprunaliga byggiloyvinum hjá Tryggingarfelagnum Føroyar setti býráðið ta treyt, at byggingin ikki skuldi órógva handilslívið á Kongabrúnni. Hetta undantakið varð tó strikað, tá endaliga byggiloyvið varð givið.

– Eg troystaði meg sjálvan við, at byggingin hjá Tryggingarfelagnum Føroyar ikki skuldi órógva handlarnar, sum hildu til í bygninginum, men eg kann bara staðfesta, at hetta er annar handilin, sum verður koyrdur út, tí Heimavirkið er eisini flutt, sigur Thorstein Arge, sum ikki er sørt misnøgdur við framferðina hjá Tórshavnar býráði.




*Thorstein Arge hevur seinastu dagarnar rokast við at flyta. Her stendur hann uttanfyri handilin við tómum pakkeskjum. Tubbakshandilin Oscar F. Arge, sum hevur hildið til á Kongabrúnni í 64 ár, flytur nú longur niðan í býin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Einasti tubbakshandilin í Føroyum flytir nú av Kongabrúnni. Hesin handilin hevur størsta úrvalið av tubbaki í Føroyum. Her standa krambagentan Marjun og Thorstein og pakka niður*
*Mynd: Álvur Haraldsen*



# GSM sambandið hvarv á Tórsvølli

**Undir steypafinaluni á Tórsvølli ólavsøkudag løgdu mong kanska til merkis, at GSM fartelefonsambandið fór. Tekniski stjórin á Føroya Tele, Hjalgrím Hentze, sigur, at hetta ikki er ein ókendur trupulleiki, og at arbeitt verður við honum**

GSM SAMBAND
*Heini í Skorini*

Upp ímóti 5.000 fólkum vórðu savnað á Tórsvølli til steypafinaluna millum HB og NSÍ ólavsøkudag. Sjáldan eru so nógv fólk savnað á einum og sama staði í Føroyum, og sjáldan eru so nógvar fartelefonir í gongd samstundis á so lítlum øki.

Samankroysti fartelefon aktiviteturin á Tórsvølli førdi við sær, at GSM sambandið fór undir sjálvari finaluni. Sambært Hjalgrím Hentze, stjóra á teknisku deild á Føroya Tele, var orsøkin ovurnýtsla av fartelefonum somu tíð og á sama staði, og sendarin, sum umfevnir hetta øki, megnaði ikki at nøkta tørvin hjá mongu fartelefonunum, og tískil fór sambandið.

### Seta upp eykastøðir

Hjalgrím Hentze sigur, at hetta ikki er ein óvanligur trupulleiki, og at sambandið kann fara undir slíkum stórum tiltøkum.

- Sendararnir, sum Føroya Tele hevur sett upp, eru ymiskir á stødd, og summir klára fleiri samtalur samstundis enn aðrir. Sendarin, sum fevnir um viðkomandi øki, hevði ov fáar kanalir til mongu fartelefonirnar, og tískil fór sambandið, sigur Hjalgrím Hentze.

Hann vísir á, at Føroya Tele setir upp eykastøðir til tiltøk sum ólavsøkuna, og hava hesir sendarar fleiri kanalir og kunnu upptaka fleiri samtalur, men hetta eru bert fyribils loysnir.

- Vit síggja, at GSM nýtslan minkar sera nógv úti á bygd um ólavsøkuna, og at hon økist samsvarandi í Havnini. Hesar dagar verða fartelefonir í øllum Føroyum savnaðar í høvuðsstaðnum, og tískil seta vit upp eykastøðir við sendarum, sum megna fleiri samtalur, greiðir Hjalgrím frá.

### Keypa nýggjan sendara

Føroya Tele fer sambært Hjalgrím Hentze at keypa nýggjan sendara. Hesin sendari verður størri, og megnar hann sostatt størri nýtslu av fartelefonum samstundis. Hjalgrím Hentze sigur, at nýggi sendarin fer at kosta hálva til trý kvarta millión, og at hann verður tøkur um nakrar mánaðir.

- Nýggi sendarin fer sjálvsagt ikki at nøkta allan tørvin, tað er ógjørligt, og hetta vil ikki siga, at trupulleikin fer at hvørva, men tað fer avgjørt at betra um umstøðurnar, sigur Hjalgrím Hentze at enda við Sosialin.



*GSM sambandið hjá mongu fartelefonunum, sum funnust millum áskoðararnar á Tórsvølli undir steypafinaluni, fór brádliga, men hetta er ein vanligur trupulleiki, sigur Hjalgrím Hentze, tekniski stjóri á Føroya Tele*

NOA® NOA
ÚTSØLA
Byrjar fríggjadagin t. 2.8.02
kl. 08.00
Alt NOA-NOA
-50%
29 Í Tróndargøtu
tel. 318200
218199